gult cyan magenta svart

TILTØK

FØÐINGAR

12. feb. fingu Jorie Poulsen og Andreas Josephsen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3300 gr.

15. feb. fingu Heidi S. Thomsen, Sumba og Tummas A. Ryggshamar, Vágur, eina dóttur. Hon var 51 cm. long ov igaði 3300 gr.

16. feb. fingu Gerda Mortensen, Skælingur og Rúni Mortensen, Streymnes, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3700 gr.

16. feb. fingu Lisa Nielsen og Jacon Vilhelm, Vágur, eina dóttur. Honv ar 52 cm. long og vigaði 3780 gr.

16. feb. fingu Heidi Davidsen og William av Vollanum, Kollafjørður, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3750 gr.

17. feb. fingu Elin H. Gudmundsen og Jan Erik Simonsen, Sandavágur, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3800 gr.

19. feb. fingu Johild Poulsen, Hvalba og Sonni Mørk, Vágur, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3710 gr.

19. feb. fingu Elsa Hansen og Jan Andersen, Toftir, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 4100 gr.

19. feb. fingu Osbjørg Eysturberg og Janus Sørensen, Hoyvík, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3600 gr.

19. feb. fingu Katrin og Hilmar Johannesen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3600 gr.

20. feb. fingu Bergitta Thomsen og Allin Simonsen, Sandur, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3950 gr.

20. feb. fingu Pnina og Petur Eyðun Dam, Kaldbak, ein son. Hann var 50 cm. langur og vigaði 2950 gr.

21. feb. fingu Erik Johansen og Joan Højsted, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3400 gr.

21. feb. fingu Annika Ryggstein og Remi Nicolajsen, Skopun, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3600 gr.

ANDLÁT

16. februar:
Othilia Davidsen, ættað úr Grønlandi, búsitandi í Galten, 55 ár.
Hjørdis Klein, 77 ár.

17. februar:
Harda Nielsen, Sumba, 67 ár.

20. februar:
Fransiska Poulsen í Fuglafirði, 81 ár.
Elmar Abrahamsen, ættaður í Oyndarfirði, búsitandi í Danmark, 68 ár.

PRÓGV

John Olsen, Leirvík, hevur tikið prógv sum datamatikari á IT Akademi í Skive.

Gunnva Olsen, Leirvík, hevur tikið prógv sum pedagogur frá seminarium í Esbjerg.

BRÚDLEYP

Í dag, 24. februar kl. 16.00 giftast í prestagarðinum á Brekku Herbjørg Eysturdal og Karstin Wigant Andersen, bæði úr Klaksvík. Vælkomst verður á Sjómansskúlanum kl. 20.00.

Gudstænastur
Sunnudag í føstuinngangi
Havnar kirkja: kl. 11, Sonja Klein
Vesturkirkjan: kl. 11, Heri Joensen
Argir: kl. 11, Ingolf Henoch Pedersen
Kaldbak: kl. 12, altarg., Bjarni Bæk
Kollafjørður: kl. 12, Marjun Bæk
Vestmanna: (Talvan gongur fyri Heimamissiónina)
Haldarsvík: kl. 12, altarg., I. P. Dam
Rituvík: kl. 11, altarg., Meinhard Bjartalíð (Talvan gongur fyri Heimamissiónina)
Gøta: kl. 12, altarg.
Æðuvík: Missiónshúsið kl. 17, Jónsvein Bech. Innsavnan verður fyri Sunnudagsblaðið
Skála kirkja: kl. 11, *Sjóvar kirkja:* kl. 12.10, Jógvan Fríðriksson
Funningur: kl. 12, messa *Gjógv:* kl. 17 messa, Emil Olsen
Leirvíkar kirkja: kl. 12, familjugudstænasta, *Hellurnar:* kl. 17, Uni Næs
Christianskirkjan: kl. 11, Niels Pauli Danielsen (Sjónvarpsgudstænasta)
Klaksv. Sjúkrahús: kl. 10, *Norðoya Røktarheim:* kl. 14.30, Elsa Funding
Sandavágur: kl. 12, Mikael Lerche Nygaard og David Johannesen (Talvan gongur fyir Meinigheitsfakultetið)
Sandur: kl. 12, fráfaringargudstænasta, altarg., Eva Brinck Jensen
Sumba: kl. 12, altarg., Bergur D. Joensen
Porkeri: kl. 12, altarg., E. Beder
Øravík: kl. 12.15, P. M. Rasmussen
Sandvík: kl. 12, Ólavur Rasmussen

Ebenezer
Sunnudagin kl. 10 Minnismáltíð Harrans, kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. møti, kl. 21 útimøti.
Mánadagin kl. 20 bønarmøti.

Hvítusunnusamkoman Yviri við Strond
Morgunmøti kl. 11, kl. 12.15 sunnudagsskúli, kl. 18 evangeliskt møti.

Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 17 landsbøn, í morgin kl. 11 morgunmøti, kl. 16 ársmøti. Mánadagin kl. 20 bønarskúlin.
Týsdagin kl. 20 ítriv til frama fyri missión.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

Samkoman Immanuel
Sunnudagin kl. 13 sunnudagsskúli, kl. 17 møti.

KFUM og KFUK í Havn
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman, við Jógvan Fríðriksson.
Hugleiðingar um føstuna.
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn.

Aglow, Tórshavn
Fundur verður í hølunum hjá Frelsunarherinum leygarkvøldið kl. 19.30, allar kvinnur eru vælkomnar.

Meinigheitshúsið í Havn
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 familjumøti við Duritu og Ejvind Mouritsen, Marjun og Beinta syngja og drekka verður at fáa aftaná møti.
Mánakvøldið kl. 19 verður LU-arbeiðið. Opið kvøld, kl. 20 venur Manskórið.

Rhema á Hálsi
Leygarkvøldið verður onki ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 17 møti og sunnudagsskúli.

Frelsunarherurin Tórshavn
Sunnudagin kl. 11 møti. Sofía Jacobsen talar, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Toril og Niels Edvard Olsen.
Mánadagin kl. 17 skótar.

Meinigheitin í Hoyvík
Sunnudagin kl. 14 í Hoyvíkar skúla sunnudagsskúli, kl. 17.30 bøn og kl. 18 møti har Símun Absalonsen talar. Øll eru vælkomin.

Hebron, Argir
Sunnudagin kl. 10.30 Minnismáltíð Harrans, kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 samkoman syngur – sangir eftir sálmaskaldið Daniel W. Whittle og tónaskaldið James Mc Granaham.

Kirkju- og missiónshúsið á Argjum
Sunnukvøldið kl. 18 møti við Finnleif Mortensen og Hans Jákup Hansen.
Mánakvøldið kl. 20 ungdómsmøti við bláa Krossi. Týskvøldið kl. 20 venur Argjakórið – nýggir limir eru vælkomnir.
Mikumorgunin kl. 07 bønarløta. Hóskvøldið kl. 20 Føstugangsgudstænasta við Hans Eiler Hammer. Talur frá missiónsvikuni eru at hoyra á heimasíðu okkara: www.koma.fo

»Tíð til Gud«
verður úti í Pálsstovu sunnukvøldið kl. 21. Hesaferð talar Ian Clifford. Dánjal av Rana og Jógvan Skýlindal skipa fyri.

Saron, Vestmanna
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, Fríðtór Debes talar.
Mánadagin kl. 20 bønarmøti.

Filadelfia, Sundalagi
Í morgin kl. 18 kvøldmøti. Týsdagin frá kl. 18-19 bønarmøti. Mikudagin frá kl. 19-21 Miðdepilin, eitt trivnaðarstað fyri ung (11 ár og eldri). Hósdagin frá kl. 16-17.30 Urtagarðurin, eitt trivnaðarstað hjá børnum í Hósvík (3-11 ár).

Lívsins orð
Onki barnamøti verður leygardagin. Leygarkvøldið kl. 20.30 Opið hús.
Sunnudagin kl. 10.30 møti við breyðbróting og kl. 19 evangel. møti.
Mánakvøldið kl. 20 undirvísing við Dávid Bech.

Bíbliuskeiðrøðin
yvir evni hin sanni lærisveinurin verður hildin í hølum hjá arbeiðarafelagnum Hæddini í Saltangará. Møtiskeiðrøðin heldur áfram hvønn mánadag kl. 19. Stigtakari og bíbillærari er David Bech.

Keldan í Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21 opið hús. Sunnudagin kl. 17 møti v/ Eyðuni Jacobsen, kl. 17 barnamøti.
Bønarmøti er hvørt mánakvøld kl. 20-21.
Morgunbønarmøti hvønn týsmorgun kl. 7-8, hós- og fríggjamorgun kl. 8-9. Tú ert vælkomin í Kelduna.

Meinigheitshúsið á Skála
Í kvøld kl. 20 verður møti við Ingolf Henoch Pedersen frá Meinigheitsfakultetinum í Århus. Innsavnan. Øll eru vælkomin.
Sunnudagin kl. 13.30 sunnudagsskúli og kl. 19 møti.

EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

Sjeynda boð: Tú mást ikki stjala.

Tjóvur trýr, at hvør maður stjelur, sigur orðtakið. Ofta er ein djúpur sannleiki goymdur í slíkum orðtøkum. Er okkara hugsan verunliga so, at um onnur taka, so kann eg gera tað eisini, ella um eg geri nakað skeivt, so ger tað einki, tí tað gera øll hini við. Slík hugsan er ein sjálvsverja, sum skal rættvísgera eina skeiva gerð. Men ein skeiv gerð er ein skeiv gerð, og skal rættvísi fremjast, so má hendan skeiva gerðin bøtast onkusvegna. Tað hava vit okkara rættarskipan til, sum byggir á lógir, ið eru til frama fyri alt samfelagið.

Sjeynda boð er ein liður í okkara rættarskipan. Tú mást ikki stjala. Tað ljóðar hart og kontant í oyrum okkara og er ikki til at misskilja. Tjóvur og ránsmaður vil eingin av okkum vera, tað liggur djúpt í okkum, øll foreldur vilja í uppalingini av børnum sínum læra tey at virða ognirnar hjá øðrum. Vit hava ikki fyri neyðini at stjala nakað frá øðrum til lívsins uppihald. Hava vit brúk fyri onkrum, kunnu vit ogna okkum tað á lógligan hátt. So er ikki har neyð og fátækdømi valdar, tað er ringt hjá okkum at skilja teirra viðurskifti, vit mugu bert ynskja og biðja eftir, at tey fáa tað betri, og veita teimum hjálp eftir førimuni.

Men at taka ljóðar nógv mildari, og verður kanska ikki tikið rættiliga í álvara. Eg kann taka bara eitt lítið sindur, tað man ikki bila. Snýta eitt sindur ella svika eitt sindur í uppgerðum til tað almenna, tað er í lagi, soleiðis tykist hugsanin hjá nógvum at vera, uttan at samvitskan verður órogvað, tí tað gera onnur helst eisini. Men eisini í slíkum førum er sjeynda boð galdandi. Tað, sum tað almenna hevur rætt til frá okkum eftir landsins lógum, er samfelagsins ogn, og eigur tískil ikki at krógvast ella goymast á einhvønn snildisligan hátt. Gev keisaranum tað, sum keisarans er. Her hava vit øll kanska nakað at hugsa um.

Sjeynda boð minnir okkum eisini á, at vit eiga at lata til onkran, sum treingir eitthvørt. At gera væl móti øðrum og vísa beinasemi, tað líkar Gudi, stendur skrivað, og somuleiðis: Sælari er at geva enn at taka.

Meistari, hvat gott skal eg gera, at eg kann fáa ævigt lív? Jesus segði: Vilt tú koma inn til lívið, tá halt boðini. (Matt. 19,16-17).

Sigvald Kristiansen

TILTØK

Ørkin, Saltangará
Møti verður sunnudagin kl. 17 í Arbeiðarafelagshúsinum Hæddini í Saltangará. Húsmøti verður í Hvalvík týsdagin kl. 19 hjá Ruth og Eskild.
Verið hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið í Leirvík
Í kvøld verður einki ungdómsmøti í Leirvík. Í staðin fara vit til Gøtu, bilar koyra frá missiónshúsinum kl. 19.45, kom og ver við, øll eru hjartaliga vælkomin.

Missións- og ungdómshúsið á Glyvrum
Leygardagin kl. 9.30 morgunmatur og bønarløta.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli og kl. 19 møti við Malmberg Olsen, aftaná møti venur Húsakórið.
Mánadagin kl. 20 byrjar missiónsvikan, Meinhard Bjartalíð talar og Húsakórið syngur. Øll eru vælkomin.

Soli Deo Gloria
Hvønn mánadag kl. 20 bíbliutími og bønarmøti.
Hvønn hósdag kl. 20 ungdómsmøti.
Hvønn sunnudag kl. 14 sunnudagsskúli.
Sunnudagin 25. kl. 16.30 ALPHA skeið (11-15 ár).
kl. 18 møti við Gulak, Jónhildu, Jónfinn og Jógvan.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missónshúsið, Skopun
Sangmøti leygarkvøldið kl. 20. Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 19 sangmøti har manskórið, Felagskórið Solo Duettir og sangbólkar luttaka.
Innsavnan til húsið.

Salem, Tvøroyri
Fundir verða í kvøld kl. 20 og sunnudagin kl. 18. John í Skemmuni og Hans Djurhuus tala.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Vegna missiónsviku í Sumba verður einki møti sunnukvøldið.

Sion, Vágur
Møti verður sunnudagin kl. 11, kl. 11.30 sunnudagsskúli og kl. 18 møti.
Telefonandaktin:
tlf. 373777.

Frelsunarherurin Vágur
Leygarkvøldið kl. 20 bøn og lovsangur. Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti v/ Eingrím Holm.
Mánakvøldið kl. 20 heimaforbundið.

Betel, Vágur
Sunnudagin 25. kl. 11 breyðbróting, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. fundur.
Mánadagin kl. 20 bønarfundur.
Týsdagin kl. 20 ungdómsfundur.
Ónsdagin kl. 20 uppbygg. fundur.

Føroyskt møti í Esbjerg
Sunnudagin 25. kl. 15 verður føroyskt møti í Zionskirkens sognhus, Nygaardsvej 103. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Frá Felagnum Pinkubarnadeyði
Vit hittast 2. leygardag í hvørjum mánaði kl. 14.00 í Jákupsstovu, J. Patursonargøta 24, 100 Tórshavn.
Nærri fæst at vita hjá Annvør Nielsen tlf. 317261, Helle Johansen tlf. 317940 ella Sólgerð Foldbo tlf. 422184.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19-21.00 á tlf. 212380.

VBA-fundir
Fundur fyri vaksin børn hjá alkoholikarum/ella ørkymlandi familjuviðurskiftum, eru hvørt leygarkvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17 (opin fundur).

Fundirnir eru á Vaskarínum, Tórsgøta 5.

AA-fundir í Havn
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Leygardagin: kl. 17-18.
Sunnudagin: kl. 11-12.

Spælistovan í Meinigheitshúsinum í Havn
er opin mánadag-mikudag og hósdag frá kl. 9.00-12.00 fyri foreldur at børnum uttan ansing.

Vágs Matmøðrafelag
Dagtilhaldið í Vági er opið týsdag og tórsdag frá kl. 15-18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Tilhaldið í Tórsgøtu 21
Opið er mánadag kl. 10-18.
Týsdag-fríggjadag 10-17.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag eins og bløðini eru til taks.
Mánadagin 26.2.
kl. 10-18 Seyma fýrkantar til teppir til móður Theresufelagsskapin
kl. 14-18 Kortspæl, telving og onnur spøl. Tilm. til døgurðan og túrin mikudagin, tlf. 316491.
Føstulávintsbollar vera at fáa.
Týsdagin 27.2.
kl. 10-12 Vit baka
kl. 15 Upplivingar frá Canada, Sheila Arnskov
Mikudagin 28.2.
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði (tilm. mánadag tlf. 316491)
kl. 14.30 Túrur niðan á Tænastumiðstøðina
Hósdagin 1.3.
kl. 10.30-11 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát um skanning, brenning, printing og nýtslu av alnótini verður á 1. hædd, Brandur Petersen
Fríggjadagin 2.3.
kl. 10-17 Opið hús.

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Pensionistafelagið í Havn
Í føstuni møtast vit hvørt hóskvøld kl. 19 í Losjuni, Tinghúsvegur 18. Hevur tú fylt 60 ár, er tú vælkomin at gerast limur.

LISA
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geils-gøtu 1 er opin hvønn hósdag frá kl. 14.00 til 20.00 og annars eftir avtalu á telefon 320197. Teldupost-ur lisa@lisa.fo – heima-síða www.lisa.fo

LÆKNAVAKTIR

Tórshavn:
Læknavaktin tlf. 310033

Eysturoy:
Leygard. 24. feb.: Kári Rasmussen, tlf. 447010
Sunnud. 25. feb.: Knud Jakobsen, tlf. 423006

Norðoyggjar:
Læknavaktin tlf. 458888

Vágar: tlf. 332413

Suðuroy (norður): tlf. 371560
Suðuroy (suður): tlf. 373030

Tannlæknavakt, Tórshavn
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13-14. Tlf. 314544.

gult cyan magenta svart